Álit

í

løgtingsmáli nr. 107/2020: Uppskot til løgtingslóg um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyriskipanin)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð tann 17. mars 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 15. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Felagið Føroyskir Grannskoðarar, Skráseting Føroya og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Johan Dahl, Bjarni Hammer, Beinir Johannesen, Jákup Mikkelsen og Henrik Old) vísir á, at tað er týdningarmikið, at føroysk lóggáva á hesum øki fylgir altjóða lóggávu, so føroyskar grannskoðarafyritøkur framhaldandi kunnu átaka sær uppgávur fyri fyritøkur, herundir føroyskar fyritøkur, ið virka á altjóða stigi.

Meirilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Bjørt Samuelsen og Bjarni Kárason Petersen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskot til løgtingslóg um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyriskipanin) snýr seg um reglur fyri fyritøkur av serstøkum almennum áhuga (Public Inerest Entities). Í Føroyum er talan um bankar, sparikassar, tryggingarfeløg og børsskrásettar privatar fyritøkur.

Hetta mál hevur verið viðgjørt saman við broytingum í grannskoðaralógini (løgtingsmál nr. 106/2020) og fylgibroytingum í vinnufelagalóggávuni (løgtingsmál nr. 105/2020).

Minnilutin tekur í prinsippinum undir við at dagføra lóggávuna á økinum, so hon er á støði við ES-lóggávu. Í hesum føri eisini í mun til krøv til grannskoðan av fyritøkum við almennum áhuga. Fleiri av stóru fyritøkunum virka eisini uttanlands, og tað skal sjálvandi bera til hjá føroyskum grannskoðarum at grannskoða føroyskar altjóða fyritøkur, eins og føroysk grannskoðaravirki eiga at kunna virka uttanfyri landoddarnar. Undir viðgerðini er víst á, at tørvur er á at fáa dagført roknskaparlógina, sum grannskoðaravirkini eisini virka eftir.

Men minnilutin heldur tað ikki vera rætt, at ES-lóggáva, í danskari umseting, verður sett beinleiðis inn í føroyska lóggávu. Slíkar reglur eiga at verða nágreiniliga gjøgnumgingnar og tillagaðar til føroysk viðurskifti, so ein ikki dregur púra óneyðugar reglur og krøv omanyvir føroysku vinnuna.

Vinnulóggávuøkið er føroyskt málsøki, og tí eigur øll lóggáva, sum verður sett í gildi á økinum, eisini at vera á føroyskum. PIE-fyriskipanin telur knappar 37 síður, og tað átti ikki at verið ógjørligt at flutt reglurnar yvir í føroyskt mál. Bæði orsakað av grundleggjandi rættinum hjá føroyingum og

vinnuni her at hava lóggávu á egnum máli, eins og øll onnur lond í ES hava og eisini fyri at menna og brúka ymisku fakheitini á føroyskum. Einstøk undantøk kunnu kanska vera, men í hesum førinum heldur minnilutin tað vera at loypa um, har garðurin er lægstur, at landsstýrismaðurin velur at seta danska reglugerð beinleiðis inn í føroyska lóg, enntá uttan umseting ella tillagingar.
Dømi um, at mann púra ókritisk flytur ES-lóggávu inn, eru reglurnar um kravt skifti av grannskoðarum innan ávísar tíðarkarmar, og støddirnar á bót fyri brot á lógina.
Reglurnar eru beinleiðis fluttar yvir í hesa lóggávu, hóast fyritøkur uttanlands kunnu vera 100 ferðir so stórar sum tær føroysku, og marknaðirnir ikki kunnu sammetast. Sum heild tykist als ikki, at atlit verða tikin at stødd og vavi á føroyska marknaðinum, har einans fáar grannskoðarafyritøkur eru og nakrir og tretivu grannskoðarar tilsamans.

Grein 4 gevur landsstýrismanninum heimild at "áseta nærri reglur, sum eru neyðugar til tess at nýta ella gjøgnumføra avgerðir og reglugerðir, sum verða givnar av Europa-kommisiónini ella øðrum ES-myndugleika við heimild í fyriskipanini, heruppií við broytingum, sum serlig føroysk viðurskifti hava við sær".

Vísandi til viðmerkingarnar omanfyri, har ov lítil orka tykist vera nýtt til at tillaga reglur til føroysk viðurskifti, og vilji ikki er at umseta reglurnar til føroykst mál, heldur minnilutin tað ikki vera ráðiligt at geva hesa víðu heimild til at seta ES-reglur beinleiðis í gildi í Føroyum uttanum Løgtingið.

Minnilutin tekur tí ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 21. apríl 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	